# Innrás at síggja grønlendskan film

GRØNLENDSKUR FILMUR

*Jan Müller*

Tað minti einki minni enn um eina innrás í Miðlahúsið í gjárkvøldið, tá grønlendski journalisturin Isak Kleist hevði frumframsýning av filmi sínum um Diskobuktina í Grønlandi. Her vóru føroyingar, grønlendingar og eisini mong útlendskt tíðindafólk, sum luttóku á veðurlagsráðstevnuni í Norðurlandahúsinum. Høgni Hoydal, landsstýrismaður í uttanríkismálum segði nøkur orð, áðrenn filmurin varð vístur. Hann vísti á týdningin Grønlandi hevur í so mongum, eitt nú tá tað snýr seg um at varðveita og vísa á eitt reint og gott umhvørvi. Ætlanin var at vísa filmin á sjálvari ráðstevnuna, men tá hetta av onkrari orsøk ikki bar til, fekk grønlendski fjølmiðlamaðurin innivist í Miðlahúsinum. Ikki bert undirtøkan var stór, eisini klappini og lovorðini til Isak vóru mong eftir sýningina. Undirtøkan vísir stóra áhugan millum føroyingar fyri Grønlandi. Myndirnar eru frá hesum heilt serliga filmskvøldinum í Miðlahúsinum.









